# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

## Býráðið

**Dagfesting:** 28.08.2025 kl. 19:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Ólavur Larsen, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, Jóan Pauli Olsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir: Leif André Eliasen fyri Eivin Breiðaskarð

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 33/25 | 25/00340-3 | Tekja til Barnalund |
| 34/25 | 25/00404-2 | broyting av byggisamtyktini á Kirkjuvegi |
| 35/25 | 25/00437-3 | Val til staðbundnu nevndina á Kambsdali |
| 36/25 | 25/00022-8 | Broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu |
| 37/25 | 24/00418-3 | Umsókn um arbeiðsskúrar |
| 38/25 | 25/00403-6 | Tilmæli um lán til íløgur hjá Fuglafjarðar kommunu |
| **Til kunning** | | |
| | | |

**Til støðutakan**

**33/25**
**25/00340-3 Tekja til Barnalund**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 02.06.2025 | 16/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 45/25 |
| 3 Býráðið | 03.07.2025 | 28/25 |
| 4 Fíggjarnevndin | 21.08.2025 | 54/25 |
| 5 Býráðið | 28.08.2025 | 33/25 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Sosiala nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | **2. juni 2025 – Sosiala nevnd**<br>Á fíggjarjáttanini fyri 2025 eru 1,5 mill. Settar av til at skifta tekjuna á Barnalund. Tekniska deild hevur biðið Heildarverk um eitt tilboð. Hettar er nú komið og ljóðar soleiðis:<br><br>Tilboð 1.721.938,35<br>Vindeygu 150.000,00 (prísur frá Velux)<br>6,25% Mvg 116.996,50<br>Ókent 15% 300.000,00<br>**Tilsamans 2.288.934,85 kr.**<br><br>Heildarverk tekur fyrivarni fyri vindeygaprísum sum tekniska deild hevur fingið frá Velux.<br><br>Tekjan er í sera ringum standi, og tað er neyðugt at skifta hana út sum skjótast. Seinasta árið hava vit afturvendandi fingið kunning frá stovninum um nýggjar lekar frá tekjuni.<br><br>Frá Heildarverk er ætlanin at fara í holt við tekjuna so skjótt sum gjørligt – tað er leveringstíð uppá dúkin sum skal brúkast. Men neyðugt er við einari eykajáttan, tí játtanin er knap 800.000 lægri enn tilboðið.<br><br>Harley Joensen frá Teknisku deild luttekur á fundinum. |

# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **12. Juni 2025 – Fíggjarnevndin**<br>Sosiala nevnd viðgjørdi málið, og avgjørdi at seta arbeiðið við at skifta tekju í gongd beinanvegin, og samstundis senda máli víðari til fíggjarnevndina við einari umbøn um eykajáttan uppá kr. 790.000 kr. Av hesum vera 300.000 settar av til møguligar ókendar útreiðslur.<br><br>Av tí at tekjan á stovninum nú er so vánalig, metir nevndin ikki, at tað er ráðiligt at útseta arbeiðið við at skifta tekjuna ella at deila arbeiðið yvir tvey fíggjarár. Samstundis bleiv greitt, at Heildarverk kann taka uppgávuna inn nú, men seinni verður verri at fáa uppgávuna at passa inn, tí umbyggingin av skúlanum eisini stendur á skrá hjá teimum.<br><br>Frá Sosialu nevnd var metingin, at uppgávan má setast í gongd við núverandi játtan, og at máli beinanvegin skuldi sendast víðari til fíggjarnevndina við einari umbøn um eina eykajáttan. Mett var, at tað á hendan hátt ber til at fáa umsóknina til tvær viðgerðir áðrenn býráðið fer í summarferiu. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Tilboð um nýggja tekju til dagstovnin Barnalund er nú komið inn, og er nakað væl hægrið enn tað sum er avsett í fíggjarjáttanini | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | X | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | **2. juni 2025**<br>Mælt verður til, at Sosiala nevnd tekur støðu til, hvussu umsitingin skal arbeiða víðari við málinum.<br><br>**12. juni 2025**<br>Mælt verður til, at fíggjarnevndin viðgerð umbøn um eykajáttan á kr. 790.000 til arbeiðið við at skifta tekjuna á Dagstovninum Barnalund. | | |
| Dagf | 1. juni 2025 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Sosiala nevnd 02. juni 2025:**
Sosiala nevnd metti, at arbeiðið skal setast í gongd, og at sosialdeildarleiðarin skal kunna býráðið um at arbeiðið verður sett í gongd uttan at játtan er til samlaðu uppgávuna. Málið skal fyri býráðið sum eykajáttan tvær ferðir áðrenn summarferiuna,

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við at ein eykajáttan uppá 790 tkr. til tekjuna á Barnalund verður løgd fyri býráðið. Eykajáttanin verður tikin av tøkum peningi.

**Býráðið 03. juli 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini um eykajáttan og sendir málið víðari til 2. viðgerð

**Fíggjarnevndin 21. august 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við eykajáttanini og sendur hana víðari til 2. viðgerð í býráðnum.

**Býráðið 28. august 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við eykajáttanini til útskifting av takinum á Barnalund.

4

**34/25**
**25/00404-2 broyting av byggisamtyktini á Kirkjuvegi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.08.2025 | 41/25 |
| 2 Býráðið | 28.08.2025 | 34/25 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Tekniska nevnd og býráð | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Eigari av matr.nr. 604 í Fuglafirði hevur gjørt vart við at teirra sethús ikki liggja í B: Sethús – Bústaðarøki men í E: Almennir stovnar. Ynski er at byggisamtyktin verður broytt soleiðis at matrikkulin liggur í B: Sethús – Bústaðarøki. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Orsøkin til at málið verður viðgjørt er, at um eigarin ynskir at gera broytingar ella at byggja út, kann umsóknin ikki viðgerðast, av tí at sethúsini ikki liggja í B: Sethús – Bústaðarøki. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Avrit av byggisamtyktarkortinum hjá Fuglafjarðar kommunu | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Tekniski leiðari mælir til at broyta byggisamtyktina fyri matr.nr. 604 í Fuglafirði frá at vera E: Almennir stovnar til B: Sethús – Bústaðarøki | | |
| Dagf | 17.07.2025 | | |



**Tekniska nevnd 18. august 2025:**
Tekniska nevnd fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara

**Býráðið 28. august 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**35/25**
## 25/00437-3 Val til staðbundnu nevndina á Kambsdali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.08.2025 | 35/25 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Býráðið hevur í kommunustýrisskipanini avgjørt at seta á stovn eina staðbundna nevnd á Kambsdali sum skal tryggja kambsdalsbúgvum ummælisrætt í málum viðvíkjandi viðurskiftum á Kambsdali. Nevndin skal vegleiða, umrøða og gera tilmæli til býráð og nevndir í málum ið hava við spurningar á Kambsdali at gera.<br><br>Nevndin skal mannast við 5 limum. Íbúgvarnir á Kambsdali velja tríggjar limir. Býráðið velur ein býráðslim, sum ikki samstudnis kann vera staðbundið umboð. Borgarstjórin er føddur limur, men kann ikki vera formaður.<br><br>Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið. Atkvøtt verður millum teir persónar, sum skrivliga hava boða kommununi frá, at teir stilla upp.<br><br>Niðanfyri er ein tíðarætlan fyri val til Kambsdalsnevndina. Eftir ætlan, skal nýggja nevndin byrja teirra arbeiði 1. januar 2026.<br><br>Tíðarætlan:<br>Vika 40 29/09-05/10: Senda kunning til kambsdalsbúgvar saman við stillingarlista<br>Vika 43 20/10-26/10: Senda áminning út um seinastu freist, at boða frá uppstilling.<br>Vika 44 27-10-02/11: Almannakunngering av valevnislista saman við kunning um valstað, upplatingartíðir og líknandi<br>Vika 48 24/11-30/11: Val til Kambsdalsnevndina |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Val til staðbundnu nevndina á Kambsdali |
| Grundarlag | Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu<br>Møgulig fylgiskjøl |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | n | J |
| | Umsitingarligar | j | J |
| Tilmæli | Mælt verður til, at býráðið tekur støðu til tíðarætlanina fyri vali til Kambsdalsnevndina | | |
| Dagf | 20.08.2025 | | |

**Býráðið 28. august 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 36/25
## 25/00022-8 Broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.08.2025 | 36/25 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Tá kommunustýrið varð skipað í januar 2025, varð frítíðarundirvísingin, sum vanliga er undir málsræði hjá mentamálanevndini, løgd undir málsræði hjá sosialu nevnd, vegna ógegni.<br><br>Støðan við hesum gegninum er nú broytt við tað, at limurin í mentamálanevndini, sum var leiðari fyri frítíðarundirvísingina hevur sagt seg úr og er farin frá hesum starvi.<br><br>Tí er viðkomandi at flyta frítíðarundirvísingina aftur undir málsræði hjá mentamálanevndini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu skulu broytingar í hesari viðgerast á tveimum býráðsfundum við í minsta lagi 14 daga millumbilið. | | |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>• Kommunustýrisskipani fyri Fuglafjarðar kommunu<br>**Møgulig fylgiskjøl**<br>• Kommunustýrisskipan Fuglafjørður við broyting 28. auguast 2025 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | n | n |
| | Umsitingarligar | n | n |
| Tilmæli | Mælt verður til at býráðið við 1. viðgerð samtykkir, at flyta frítíðarundirvísingina frá sosialu nevnd til mentamálanevndina, nú gegni í nevndini nøktandi, hesum viðvíkjandi. | | |
| Dagf | 19. auguast 2025 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Býráðið 28. august 2025:**
Jastrid av Dalbø fór av fundinum.

Býráðið tók einmælt unndir við tilmælinum og sendir málið víðari til aðru viðgerð.

10

**37/25**
**24/00418-3 Umsókn um arbeiðsskúrar**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 2 Tekniska nevnd | 10.02.2025 | 3/25 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.04.2025 | 18/25 |
| 4 Býráðið | 28.08.2025 | 37/25 |
| 5 Tekniska nevnd | 18.08.2025 | 38/25 |
| 6 Mentamálanevndin | 26.08.2025 | 38/25 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Tekniska nevnd, fíggjarnevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fuglafjarðar Bátafelag hevur seinastu árini ikki verið serliga virkið. Nú hevur nýggj nevnd tikið yvir og er ætlanin, at felagið skal vera meir sjónligt og virkið í bygdarlívinum. Fundarvirksemið er lagt í fasta legu eins og limafundir vera um heystið, vetur og tíðliga um vári.<br>Eitt av stóru ynskjunum hjá limunum í Fuglafjarðar Bátafelag hevur verið, at fingið egin høli við bátahylin.<br>Bátafelagið hevur sent umsókn til Fuglafjarðar kommunu um kommunan vil selja arbeiðsskúrarnar sum vegadeildin hevur tá ið vegadeildin flytir í nýggj hølir.<br><br>**10.02.2025:**<br>Bátafelagið hevur rykt eftir svarið um kommunan ætlar at selja arbeiðsskúrarnar.<br>Ætlanin er at nýta arbeiðsskúrarnar inntil vegadeildin er flutt í nýggj hølir sum væntast kann vera í apríl/maj. Eftir hetta er spurningurin um skúrarnir skulu seljast, ella um teir skulu vera fyribils hølir hjá ruskplássinum meðan húsið verður umvælt og gjørt innflytingarklárt.<br><br>**07.04.2025:**<br>Umsitingin hevur haft ein fund við formannin í bátafelagnum um at lýsa tørvin á hølum til bátafelagið.<br>Formaðurin í bátafelagnum kom á fund hin. 13. mars, saman við tekniska leiðaranum.<br>Orsøkin til at bátafelagið hevur eitt ynski um at hava hølir niðri við bátahylin er, at so eru hølini beint við bátarnar. Eisini hava |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">teir eitt ynski um skúrarnir kundu verið ein fyribils loysn, at gera tað hugnaligt rundanum, soleiðis at teir kunnu skipa fyri onkrum sosialum, tá ið onnur tiltøk eru í Fuglafirði.<br><br>Felagið vil bera allar útreiðslurnar, eisini viðvíkjandi flyting av arbeiðsskúrunum, gera fundamentir, leggja kloakk og vatn til húsið og annars tað sum krevst fyri at fáa tað at síggja ordiligt út rundanum. Eisini segði formaðurin at alt verður gjørt soleiðis at tað lætt kann takast burtur og flytast tá ið hetta verður neyðugt.<br><br>18.08.2025:<br><br>Fundur hevur verið í miðbýarnevndini har arkitekturin ikki metir at tað er nøkur forðing í at seta skúrarnar har inntil ein ítøkilig ætlan á økinum fer í gongd.<br><br>26.08.2025:<br><br>Í samband við at Tekniska nevnd hevur tikið avgerð um at fylgja tilmælinum frá umsitingini, um at skúrarnir verða latnir sum stuðul til bátafelagið, skal málið viðgerast í mentamálanevndini, sambært stuðulspolitikinum hjá Fuglafjarðar kommunu. Avtala skal gerast við bátafelagið um treytir í samband við leigumál og staðseting av skúrum, umframt at bátafelagið ber kostnaðin av at flyta skúrarnar.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Bátafelagið hevur sent fyrispurning til Fuglafjarðar kommunu um at keypa arbeiðsskúrarnar hjá vegadeildini</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn<br>• Umsókn frá bátafelagnum<br>• Teldupostur frá formanninum í bátafelagnum móttikin 29.01.2025</td></tr>
<tr><td colspan="4" align="center">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Tekniski leiðari mælir til at nevndin tekur støðu til um arbeiðsskúrarnir skulu seljast. Og um so er, at nevndin tekur atlit til:<br>Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn,<br>§1.<br>Um ikki annað er ásett í lóggávuni, skal fastogn hjá kommununi verða boðin út alment, áðrenn ognin verður seld, sbr. tó § 2.<br>§ 2.</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| | *Fastogn nýtist tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um 1. sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap, sbr. § 57 í kommunustýrislógini, 2. sølu til felag, stovn v.m., sum kommunan lógliga kann veita stuðul,*<br>Í hesum førum er bátafelagið áhugafelag sum samb. stuðulspolitikkinum hjá Fuglafjarðar kommunu kann søkja um stuðul sum eitt áhugafelag, kap.2 §2. pkt. 5<br><br>**10.02.2025:**<br>Tekniski leiðari mælir til at nevndin tekur støðu til:<br>- um arbeiðsskúrarnir skulu seljast, og um teir skulu seljast, at ognin verður boðin út samb. *Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn,*<br>- ella um ognin kemur undir stuðulspolitikkin hjá Fuglafjarðar kommunu kap. 2 §2. So skal málið viðgerðast í Mentamálanevndini og leiguavtala gerast.<br><br>**07.04.2025:**<br>Tekniski leiðari mælir til at nevndin tekur støðu til, út frá lýsta tørvinum frá Bátafelagnum, um:<br>- um arbeiðsskúrarnir skulu seljast, og um teir skulu seljast, at ognin verður boðin út samb. *Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn,*<br>- ella um ognin verður latin sum stuðul og tí verður viðgjørd undir stuðulspolitikkinum hjá Fuglafjarðar kommunu kap. 2 §2. So skal málið viðgerðast í Mentamálanevndini og leiguavtala gerast.<br><br>Eisini er umráðandi um arbeiðsskúrarnir verða ein fyribilsloysn hjá bátafelagnum at húsast í, at ein staðseting verður sett, og annars at øll onnur viðurskifti viðvíkjandi sáttmála um leigu av lendi o.ø. koma uppá pláss og verða viðgjørd politisk.<br><br>**18.08.2025:**<br>Umsitingin mælir til at síðani miðbýarnevndin og arkitekturin ikki meta at tað er ein trupulleiki at seta skúrarnar har fyribils, at nevndin enn einaferð tekur avgerð um:<br>- um arbeiðsskúrarnir skulu seljast, og um teir skulu seljast, at ognin verður boðin út samb. *Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn,*<br>- ella um ognin verður latin sum stuðul og tí verður viðgjørd undir stuðulspolitikkinum hjá Fuglafjarðar kommunu kap. 2 §2. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | So skal málið viðgerðast í Mentamálanevndini og leiguavtala gerast.<br><br>**26.08.2025:**<br>Mælt verður til at lata skúrarnar sum stuðul samsvarandi stuðulspolitikki Fuglafjarðar kommunu og tilmæli frá Teknisku nevnd.<br><br>Í avtalu við Bátafelagið skal leggjast áherðsla á, at Bátafelagið fær ásett tíðarskeið at avrigga og flyta skúrar, tá Fuglafjarðar kommuna sambært Miðbýarætlan, fer í gongd við økið, har skúrarnir verða staðsettir. |
| Dagf | 08.10.2024/ 29.01.2025/ 27.03.2025/ 17.07.2025 |

**Tekniska nevnd 17. oktober 2024:**
Tekniska nevnd, Sonni á Horni og David Andreassen, mæla til at bíða við at taka avgerð viðvíkjandi skúrunum, inntil skúrðarnir ikki verða nýttir meira.
Men spyrja inn til um bátafelagið kann fara inn í felagshølini inni í egningarskúrðunum til málið verður tikið uppaftur tá ið skúrðarnir eru tøkir. 14
Eivin S. Breiðaskarð luttók ikki í viðgerðini av hesum málinum.

**Tekniska nevnd 10. februar 2025:**
Tekniska nevndin, Sonni á Horni, Kristian Martin Petersen og Jóan Pauli Olsen, halda fast í avgerðini frá 17. oktober 2024 og vísa á høli í egningarmiðstøðini. Nevndin mælir til at umsitingin tekur samskifti upp við bátafelagið um hølisviðurskiftir, og lýsa tørvin hjá áhugafelagnum.

**Tekniska nevnd 07. apríl 2025:**
Tekniska nevndin, Sonni á Horni og Eyðun á Lakjuni duga væl at síggja at staðsetingin er góð til bátafelagið. Men av tí at Fuglafjarðar kommuna arbeiðir við miðbýarætlanini, og staðsetingin av skúrunum kemur í konflikt við hesa, so má avgerðin gerast í Nevndini fyri miðbýarætlanini og býráðnum fyrst, um hvørja raðfesting hetta økið hevur í mun til arbeiðið við miðbýarætlanini.

Eivin S Breiðaskarð viðgjørdi ikki hetta málið.

**Tekniska nevnd 18. august 2025:**
Tekniska nevndin fylgir tilmælinum frá umsitingini um at ognin verður latin sum stuðul og tí verður viðgjørd undir stuðulspolitikkinum hjá Fuglafjarðar kommunu kap. 2 §2. Samstundis skal málið viðgerðast í Mentamálanevndini og leiguavtala gerast. Tekniska nevndin setur sum krav at skúrarnir eru estetiskir at hyggja at, og at bátafelagið ber allar útreiðslir av flytingini, uppsetanini og viðlíkahaldinum. Kommunan leggur rør og bindur í til kloakk og vatn.

Eivin Breiðaskarð viðgjørdi ikki málið. Fyri Eivin Breiðaskarð var Kristian Martin Petersen sum eykalimur inni.

**Mentamálanevndin 26. august 2025:**
Mentamálanevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini og Teknisku nevnd.

**Býráðið 28. august 2025:**
Atkvørr varð í málinum har 4 atkvøddu fyri 3 ímóti og 2 blankar. Fyri atkvøddu Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen og Jóan Pauli Olsen. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Ørvar Jacobsen og Ólavur Larsen. Blankt atkvøddu Jastrid á Dalbø og Leif André Eliasen. Tilmælið frá teknisku nevnd og mentamálanevndini varð sostatt samtykt.

15

Fundurin lokin kl. 20.30

Dávur Juul

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

Leif André Eliasen

19

Jóan Pauli Olsen

Jastrid á Dalbø

Ørvar Jacobsen

Kristian Martin Petersen